## Undirvísingar- og mentamálstýrið
### Mentamáladeildin

# ENDURLÝSING
## Rektari
## til Sjúkrasystraskúla Føroya

Vegna ov fáar umsóknir verður við hesum lýst av nýggjum eftir rektara til Sjúkrasystraskúla Føroya.

Sjúkrasystraskúli Føroya fer, umframt at fevna um sjúkrasystraútbúgvingina, eisini at fevna um tær nýggju almanna- og heilsuútbúgvingarnar. Sjúkrasystraskúli Føroya fer sostatt at hava tvær útbúgvingarrásir, og fer hvør rásin sær at hava ein deildarleiðara við fakligari og námsfrøðiligari ábyrgd.

*Starvið*
Rektarin umboðar skúlan úteftir og hevur undir Undirvísingar- og Mentamálastýrinum evstu ábyrgd av, at útbúgvingarnar verða framdar sambært galdandi lógum og reglum.

Afturat skúlanum verður knýttur skrivari, ið er rektaranum til hjálpar við fyrisitingaruppgávum.

Rektarin hevur eina ávísa undirvísingarskyldu.

*Førleikakrøv*
- Sjúkrasystraútbúgving við viðkomandi framhaldsútbúgving ella eftirútbúgving
- Royndir innan leiðslu, undirvísing og annað námsfrøðiligt virksemi
- Góð leiðslu- og samstarvsevni
- Skil fyri fíggjarstýring og fyrisitingarligum viðurskiftum

Tað er av týdningi, at rektarin er før/ur fyri at leiða og fyrisita báðar útbúgvingarrásirnar, og kann virka í góðum samstarvi við starvsfelagar.

Rektarin skal kunna savna, samskipa og hava yvirlit. Rektarin skal vera menningarsinnað/ur og kunna fáa í lag eitt álitisfult og mennandi samstarv bæði innan- og uttanhýsis.

*Vit bjóða*
Eitt starv við avbjóðing, har tú verður við til at skapa sjálvt starvið, eins væl og ta víðari menningina á skúlanum.

*Setanar- og lønartreytir*
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Sjúkrasystrafelag Føroya.

*Umsókn*
Umsókn við prógvum o.ø verður at senda til:

Undirvísingar- og Mentamálastýrið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi **14.08.2000**, kl. 15.00.

Starvið verður at seta skjótast tilber.

Rektarin verður við til at seta bæði deildarleiðarastørvini.

Um tygum ynskja fleiri upplýsingar, herundir eina starvslýsing, kunna tygum ringja til Jóannes Dalsgaard, deildarstjóra, á tlf. 215052 ella Kristionnu S. Jacobsen, fulltrúa, á tlf. 314545 (privat).

***Undirvísingar- og Mentamálastýrið*** *hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*
***Sjúkrasystraskúli Føroya*** *hevur tvær útbúgvingarrásir, har onnur rásin er sjúkrasystraútbúgvingin og hin tær nýggju almanna- og heilsuútbúgvingarnar. Sjúkrasystraútbúgvingin er ein miðallong framhaldsútbúgving á 45 mðr.. Almanna- og heilsuútbúgvingarnar umfata almanna- og heilsuhjálparaútbúgvingina, 1 ár, og almanna- og heilsurøktaraútbúgvingina, 1½ ár. Í løtuni eru um 9 størv á Sjúkrasystraskúla Føroya, og økist hetta nakað, tá tann nýggja skipanin er farin at virka.*

## ALV-Stýrið
Postboks 1122, 110 Tórshavn

# Fyristøðufólk til Sjálvsognarstovnin »ALV«

Við hesum verður søkt eftir fyristøðufólki til Sjálvsognarstovnin "ALV".

Endamálið hjá ALV er at verða arbeiðstarnaðum til hjálpar við framleiðslu og annars at hjálpa avlamnum til arbeiðis soleiðis:

- At royna arbeiðsevnini hjá arbeiðstarnaðum við atliti til meting um møguleika hjá tí einstaka at arbeiða.
- At menna arbeiðsmøguleikarnar hjá arbeiðstarnaðum sum heild.
- At skipa fyri arbeiðsvenjing, endurbúgving, og umskúling, so vinnutarnaði kunnu fara aftur til arbeiðis.
- At skipa fyri fakligari útbúgving, handaliga ella bókliga av arbeiðstarnaðum.
- At skipa fyri vinniligum vardum arbeiði fyri avlamnum, sum ikki hava førleika at arbeiða í vanligari vinnu.
- At stuðla arbeiðstarnaðum at virka og til at avhenda vørur.

ALV rekur skúlan við Áir, verkstað, pylsubúð og sølubúð har virkaðu lutirnir verða seldir.

**Arbeiðsøki og heimildir hjá Fyristøðufólkinum.**
- Standa fyri dagligu fyrisitingini, harundir, setan av starvsfólki í samráð við stýrið fyri ALV
- Ábyrgd fyri ráðlegging, raðfesting, íverksetan og samskipan av arbeiðsuppgávum á stovninum.
- Ábyrgd fyri støðugari menning á stovninum, soleiðis at stovnurin støðugt tillagar seg tørvinum hjá brúkarunum.
- Fyristøðufólki hevur heimild til, saman við stýrisformanninum, ella stýrislimum at binda stovnin.

**Ynskiligt er við umsøkjara sum lúkar niðanfyrinevndu krøv:**
- Hóskandi ástøðilig útbúgving.
- Royndir og áhuga fyri leiðslu.
- Góð leiðslu- og samstarvsevni.
- Evni at seta í verk fyriskipanir.
- Kunnleika til fíggjarstýring.

**Lønar- og setanartreytir:**
Fyristøðufólkið verður sett í starv av Stýrinum fyri Sjálvsognarstovnin ALV.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita við at venda sær til: Bartal Kass, stýrisformann, tlf. 221310.

Umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til:
**Sjálvsognarstovnin ALV,**
Postsmoga 1122,
110 Tórshavn.

Umsóknarfreistin er **1. september 2000.**


# DEKK!
## Søla, skift og avbalansering
**Vit skifta eisini olju og filtur**
## HS Dekk
**v/ Hugo Skorastein**
**Leirvík**
**Tlf. 222018**



O2
**Elin Danielsen**
**Útb. fysioterapeutur**
Dr. Jakobsensgøta 22
100 Tórshavn
Tlf. 21 44 77
stephanssons hús
**ORKU TIL VØDDARNAR - KROPPIN Í JAVNVÁG**
HITA · MASSAGU · LINNA
Eingin sáttmáli er við Sjúkrakassan



# Eysturoyingar
Nýtt teoriskeið byrjar aftur hóskvøldið 10/8 kl. 19.00

Stanley Olsen, **tlf. 211099**
Ole Lykke, **tlf. 220972**
Hugo Kristiansen, **tlf. 225225**




## Undirvísingar- og Mentamálastýrið
### Mentamáladeildin

# Leiðari til Altjóða Skrivstovu

Altjóðagerðin á útbúgvingarøkinum ger, at størri tørvur er á vitan um útbúgvingar, stuðulsmøguleikar og liviumstøður í øðrum londum, soleiðis at vit eru før fyri at geva lesandi nøktandi leiðbeining. Tørvur er eisini á øktum samskifti við útlendskar lærustovnar, og á at vit kunnu fylgja við í og umsita millumlanda avtalur og skipanir.
Undirvísingar- og Mentamálastýrið fer tí at seta á stovn Altjóða Skrivstovu, og verður í hesum sambandi søkt eftir einum akademiskum starvsfólki at verða leiðari fyri Altjóða Skrivstovuni.

**Starvið**
Høvuðsuppgávurnar hjá leiðaranum eru m.a.:
- savna vitan um hægri útbúgvingar-, granskingar- og stuðulsmøguleikar til lesandi
- virka fyri umbýti av lesandi millum Føroyar og útlendskar lærustovnar
- styrkja samskiftið við lærustovnar uttanlands
- ráðgeva viðvíkjandi góðskriving (meritering)
- ráðgeva lærustovnum í spurningum um útbúgvingar og viðkomandi viðurskifti annars í útlondum
- fáa sambond við leiðarar á øðrum altjóða skrivstovum
- upplýsa alment um lestrar- og stuðulsmøguleikar og gera kunningartilfar
- veita lesandi beinleiðis ráðgeving og praktiska hjálp til lesandi, serliga teimum sum ætla sær uttanfyri Danmark at lesa hægri lestur

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a., at umsøkjararnir:
- hava útbúgving frá hægri lærustovni
- hava áhuga fyri umsiting
- hava áhuga fyri hægri útbúgvingum
- eru førar/ir fyri at arbeiða sjálvstøðugt og kunna taka avgerðir
- hava góð samstarvsevni og eru fyrikomandi

Harumframt er tað ein fyrimunur, at umsøkjararnir hava royndir úr øðrum starvi.

**Vit bjóða**
- Eitt ábyrgdarfult, áhugavert og fjølbroytt starv, har tú sjálv/sjálvur ert við til at skapa starvið
- Eitt starv, har tú ert við til at byggja nakað frá grundini
- Eitt starv, sum er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti úteftir

Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

Tú kemur at arbeiða í einum spennandi umhvørvi við skiftandi uppgávum tætt saman við politisku myndugleikunum og stovnum innan undirvísing og mentan.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og viðkomandi yrkisfelag.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um aðalstýrið og stovnar tess.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum o.ø. skulu sendast til:

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið**
**Postrúm 3279**
**110 Tórshavn**

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 4. september 2000, kl. 15.00.

Starvið verður at seta skjótast tilber.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Petur Petersen, aðalstjóra í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum ella Jóannes Dalsgaard, deildarstjóra í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum, á tlf. 35 50 50 ella á fartelefon 21 50 52.

***Undirvísingar- og Mentamálastýrið*** *hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*
*Uppgávurnar hjá* ***Altjóða Skrivstovuni*** *verða millum annað at veita Fróðskaparsetri Føroya og granskingar- og aðrar hægri lærustovnar tænastur innan samskifti við útlendskar hægri lærustovnar. Herundir at ráðgeva innan góðskriving o.a. Harumframt skal Altjóða Skrivstovan virka sum savningarmiðdepil fyri vitan um hægri útbúgvingar, granskingar- og stuðulsmøguleikar fyri lesandi. Altjóða Skrivstovan verður bygnaðarliga beinleiðis undir Undirvísingar- og Mentamálastýrinum. Skrivstovan fer at húsast saman Setursskrivstovuni hjá Fróðskaparsetri Føroya.*


# Ein av heimsin kendastu floytuspælarum
# MANUELA WIESLER
## í Føroyum



**Norðurlandahúsið**
***Týsdagin 15. august kl. 19.30***
**Býráðssalurin í Runavík**
***Hósdagin 17. august kl. 19.30***

**Atgongumerkir fáast á kunningarstovunum í Runavík og Tórshavn og á konsertstøðunum.**

**KONSERTFELAGIÐ OG NORÐURLANDAHÚSIÐ**

Sosialurin - 311820



# Til sølu
Nýggjur Volvo V70, 140 km, vínreyður við alu-felgum 17" og aðrari eykaútgerð.

Silvurgráur Mazda 323, 2.0 diesel við sportsfelgum, árg. 98, 12.500 km.

**Tlf. 457554 ella 283161**



**VEGG SAGING**
Hurðar, vindeygu, veggir, garðar o.a.

**HOL SAGING**
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

**GÓLV FRESING**

**GÓLV SLÍPING**

**GÓLV SAGING**
Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

# FØROYA BETONG SAGING
**v/Hjaltur Tausen**
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

Sosialurin - 311820





*Leverandørurin til entreprenørar í 28 ár...* Tosið við okkum!
# Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008



## Nýggjar TANNPROTESUR
**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**
Kliniskur tannteknikari
**BERGUR Á REYNATRØÐ**
Bøkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
**Stongt vegna summarferiu til 21. aug.**



# Lesið sosialin